# Deyðarevsing á breddanum í Margarinfabrikkini

**Týsdagin var tiltak um deyðarevsing, sum Amnesty skipaði fyri í samband við altjóða dag móti deyðarevsing. USA var serliga á breddanum, og nógv undraðust á, hvussu eitt so framkomið samfelag kann stuðla deyðarevsing**

DEYÐAREVSING
*Orð & myndir: Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Filmur um deyðarevsing varð sýndur í Margarinfabrikkini. Amnesty skipaði fyri tiltaki í samband við altjóða dagin móti deyðarevsing*

Týsdagin 10. oktober var altjóða dagur móti deyðarevsing. Í hesum sambandi skipaði Amnesty Føroyadeild fyri almennum tiltaki í Margarinbrikkini klokkan 20 týskvøldið. Umleið 20 fólk vóru komin til tiltakið. At byrja við var framløga frá Unn Poulsen, skrivara. Hon hevur gjørt eina uppgávu um deyðarevsing, tá ið hon las enskt.

- Eg havi stóran áhuga fyri USA, og eg ferðaðist nógv har yviri, tá ið eg las. Eg skuldi skriva uppgávu um deyðarevsing sum heild, men eg valdi at avmarka tað til einans í USA. Eg havi altíð undrast á, at eitt so framkomið samfelag heldur fast við deyðarevsing, sigur Unn Poulsen.

**"Though on crime"**

Í framløguni kom millum annað fram, at amerikumenn hugsa øðrvísi enn evropearar. Ein politikari skal helst vera "though on crime" (sláa hart niður á lógarbrot), og hetta verður ofta avgjørt út frá, um tú ert fyri deyðarevsing ella ikki. Politikararnir, sum er ímóti deyðarevsing, verða róptir at vera "soft on crime", og tað er sera neiligt fyri teir. Deyðarevsing er eitt fólksligt krav í USA. 65 % eru fyri deyðarevsing, og tí er tað torført hjá politikarunum at taka eina aðra støðu.

Eitt dømi, sum Margretha Nónklett, samskipari, tók fram, er vælumtókti fyrrverandi forsetin í USA Bill Clinton. Hann tók avgerð um at avrættað ein sera menningartarnaðan mann eftir stórt trýst. Við hesum vildi hann vísa, at hann var "though on crime". Ein sera ómenniskjanslig gerð hugsa vit, men hann verður mettur at hava somu virðir sum evropearar.

- Hesin tilburðurin er vorðin kendur síðani tá. Deyðadømdi maðurin hjálpti teimum at finna pulsæðrina, sum deyðiliga sproytan skuldi í, tí at hann helt, at hann var til lækna. So menningartarnaður var maðurin, segði Margretha Nónklett.

**Tølini tey somu í Evropa**

Í Føroyum virkar tað kanska ókent og órelevant at tosa um deyðarevsing. Vit halda, at evropearar eru eitt framkomið fólk, sum er ímóti avrættingum, men soleiðis er ikki.

- Eg havi sæð eina kanning, sum vísir at næstan eins stórt prosenttal og í USA er fyri deyðarevsing í Evropa. Granskarar siga, at undirtøkan fyri deyðarevsing er vaksin síðani 11/9 september, tá ið yvirgangsatsóknin á World Trade Center varð framd, sigur Unn Poulsen.

Uppgávan hjá Amnesty í hesum málinum er at upplýsa, varpa ljós á og at leggja trýst á lond. Amnesty tekur frástøðu frá deyðarevsing við støði í mannarættindasáttmálanum og altjóða yvirlýsingini hjá ST. Amnesty er limur í World Coalition Against the Death Penalty.

**Rasisma spælir inn**

Eftir framløguna varð ein filmur vístur, sum setti ljós á, at tað eru feilir við rættarskipanini í USA. Fleiri eru vorðin dømd undir skeivum grundarlag, og rasisma spælir ofta inn. Tað slepst ikki undan at feilir koma fyri, og tí er tað skeivt at geva eina so endaliga revsing, kom fram á fundinum.

Aftaná filmin høvdu fólk høvi at gera viðmerkingar og spyrja spurningar. Nógv høvdu okkurt á hjartað, og tað var røtt um, hvussu Amnesty betri kann fáa sín boðskap út. Tað var víst á, at tað gongur framá hjá Amnesty, og tey hava nú tvey starvsfólk. Margretha Nónklett er samskipari, og hon arbeiðir fulla tíð. Unn Poulsen er skrivari, og hon arbeiðir hálva tíð. Tosað var um at gera meira burturúr næstu ferð og møguliga fáa annað høli. Eisini kom upskott um at fáa onkran, sum hevur sitið á deyðsgongini og síðani er vorðin leyslatin, hendanvegin og greitt frá persónligum upplivingum.



*Hesar kvinnunar eru allar virknar í Amnesty. Frá vinstru: Nanna Jurgens, Margretha Nónklett (samskipari), Katrina Petersen (limur), Annika Sølvará (forkvinna), Unn Poulsen (skrivari), Charlotte Ballebye (í starvslæru)*

# Kristiligur leiðari ímóti deyðarevsing



**Dánjal á Dul Jacobsen er fyristøðumaður í Evangeliihúsinum. Hann er ímóti deyðarevsing. Hann undrast á, at George W. Bush, sum verður mettur at vera konservativt kristin, er fyri deyðarevsing**

DEYÐAREVSING
*Orð & mynd: Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Dánjal á Dul Jacobsen var til staðar, tá ið Amnesty skipaði fyri tiltaki ímóti deyðarevsing. Hann er somkomuleiðari í Evangeliihúsinum. Sosialurin spurdi hann um hansara støðu til deyðarevsing

- Sum kristin eri eg ímóti deyðarevsing, tí at øll hava rættin til lív. Tað var serliga rámandi í filminum, sum varð sýndur, har ið ein maður spurdi, um tú hevði viljað tendra kontaktina á stólinum, sum ein deyðadømdur sat í. Tað fær fólk til at hugsa um teirra støðu.

Dánjal er glaður fyri tiltakið hjá Amnesty

- Eg haldi, at hetta var sera áhugavert. Tað eru ikki meira enn tríggir mánaðir síðani at tríggir kristnir menn vórðu avrættaðir í Indonesia, og tað var eftir eina órættvísa rættargongd. So hetta upptekur okkum eisini.

George W. Bush verður mangan mettur at vera konservativur kristin, og tí er hann væl umtóktur millum nógvar kristnar føroyingar fyri hansara sjónarmið um fosturtøku og samkynd. Men hvat halda tey so um hansara greiðu støðu fyri deyðarevsing?

- Eg havi ongantíð skilt hansara støðu í tí málinum. Hann hevur nógv góð sjónarmið, men hatta skilji eg als ikki. Um vit leggja nóg nógv trýst á, so verður deyðarevsing møguliga avtikið aftur, sigur Dánjal at enda.

# Ung ímóti deyðarevsing



**Sosialurin tosaði við tvey ung, sum vóru til tiltakið hjá Amnesty, um deyðarevsing**

DEYÐAREVSING
*Orð & mynd: Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Thór Simonsen og Barbara Méresse vóru til tiltakið hjá Amnesty. Sosialurin spurdi tey, hvat tey halda um evnið, og hví tey komu til tiltakið.

- Eg havi altíð havt áhuga fyri deyðarevsing. Eg eri sjálvur frá Kanada, har ið tað er væl upplýst ímóti deyðarevsing, og eg havi altíð undrast á, at tey útføra deyðarevsing í USA. Sjálvur eri eg ímóti deyðarevsing. Eg kenni heldur ongan, sum er fyri tí, sigur Thór.

Barbara Méresse er úr Frankaríki. Mamman er føroysk.

- Eg hoyrdi um tiltakið stutt áðrenn tað byrjaði, og hetta hevur mín áhuga. Tí valdi eg at fara ein túr. Eg eri sjálv ímóti deyðarevsing, sigur Barbara.